52-089/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 89/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um avgerðirnar um gjald fyri koronukanningar við markið**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hví eru koronukanningar av ókoppsettum ferðandi við markið ókeypis ?
2. Hvussu nógv væntar løgmaður, at kostnaðurin hjá landskassanum fyri hesar koronukanningarnar fer at verða?
3. Er ætlanin at leggja uppskot fyri Løgtingið um, at øll ferðafólk, koppsett sum ókoppsett, skulu rinda fyri koronukanningar við markið á sama hátt, sum tað áður var galdandi?
4. Um ikki, hvør er orsøkin til hesa støðutakan ?

**Svar:**

**Til spurning 1.**

Heimildirnar at seta í verk tvungnar kanningar av fólki sum koma til landið at hindra at smittandi sjúka breiðir seg í Føroyum liggja hjá Farsóttarnevndini. Hesar heimildir eru reglubundnar í anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme § 16.

Útreiðslur sum standast av kanningum við komu til Føroya ber landskassin sbr. somu lóg § 28 stk. 1. Í somu grein er í ávísum serførum heimild at líkna útreiðslurnar á privatfólk, men tað er tað ikki hvat ið viðvíkur kanningum við vanliga komu til Føroya ella tvungið sóttarhald.

Skal rokning sendast tí einstaka fyri útreiðslurnar sum standast av kanning við komu til Føroya, so krevst, at ein heimild verður fingin til tess í lógini um smittandi sjúkur.

Koronakanningar hava, sum kunnugt, ikki verið við markið síðan 31. august 2021. Men frá 15. november 2021 hevur Farsóttarnevndin gjørt av, at øll sum koma til Føroya, og sum ikki kunnu vísa koronapass, skulu kannast fyri korona. Mær hevði dámt betur, at krav var um, at øll sum koma til Føroya, verða kannað, men tað er Farsóttarnevndin, sum hevur heimildirnar at gera hetta av.

Landsstýrið hevur alla tíðina havt ta støðu, at tey sum ferðast, eisini sjálvi mugu bera tann kostnað, sum stendst av teim tiltøkum, sum sett eru í verk við markið fyri at forða teimum í at bera smittu til landið.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

52-089/2021



Við løgtingslóg nr. 139 frá 29. september 2020 um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 2021, hevur verið álagt eitt ferðaavgjald "við komu til Føroya" uppá 312,00 kr. Tað sum útloysti avgjaldið var sjálv koman til Føroya. Rindast skuldi óansæð um ein við komu var kannaður ella ikki. Talan var um at áleggja tí einstaka, sum kom til landið, eitt ferðaavgjald, sum kundi nýtast til at gjalda landskassans útreiðslur fyri koronakanningina. Hetta ferðaavgjald verður ikki longur kravt, av tí at lógin fór úr gildi tá ið givist var við koronakanningum 31. august 2021.

**Til spurning 2.**

Tað er sera torført at meta um, hvat kostnaðurin verður av kravdum koronakanningum við komu til Føroya komandi mánaðirnar, tí at fyritreytirnar eru so óvissar.

Við umbøn um eykajáttan er biðið um 2 mió. kr. til kanningar fyri korona við komu til landið frá 13. november og árið út. Tað er ein minni partur av teimum ferðandi, ið ikki hava koronapass, og tí skulu kannast við landamarkið.

Avtalan við veitara er 250 kr. fyri hvørja kanning, umframt 5.000 kr. fyri hvørt flogfar, tó í mesta lagi fyri 4 flogfør um dagin. Henda avtala er fyri fyrst galdandi í 14 dagar.

**Til spurning 3 – 4.**

Vit eru nú á einum vegamóti. Um vit skulu taka gjald bert frá teimum sum verða kannaði við komu, so krevst at lógin um smittandi sjúkur verður broytt soleiðis at heimild er fyri at senda rokning til tann einstaka, sum verður kannaður við markið. Tað verður tó helst ikki í bræði, tí at fyrst skal farsóttarmálsøkið yvirtakast, og vit vita av royndum at tað kann taka tíð.

Um Farsóttarnevndin ger av at øll skulu kannast, fer landsstýrið at skjóta upp, at undanfarna avgjaldslóg, har øll skulu gjalda fyri koronakanning við komu, verður sett í gildi aftur.

Í Tinganesi, 19. november 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður